# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## ABC – tað trygga?

Undir tí mangan harðliga orðaskifti, ið hevur leikað á, hevur ofta verið víst á gomlu ABC samgonguna sum tað trygga, tað, sum tryggjaði politiskan stabilitet. Tað kann ikki noktast, at heilt fram móti endanum var valskeiðið eyðkent av góðum stabiliteti og róligari politiskari gongd. Henda mynd verður líkasum styrkt við tí turbulentu fullveldissamgonguni í baksýni.

Hinvegin kemst ikki uttanum, at hesir sjey mánaðirnir við CHE samgonguni hava verið órógvaðir av nógvum og djúpum ósemjum. Men hesar ósemjur hava meira verið innanflokka enn samstarvsflokkanna millum. Her var so ein orsøkin til, at tað var trupult at stýra, ein onnur orsøkin tykist at hava verið trótandi álit millum lyklapersónar í samgonguleiðsluni. Spell, tí sum vit skrivaðu fyrr í vikuni, so var samgonguskjalið hjá CHE samgonguni eyðkent av nýhugsan á mongum økjum og hetta var eitt stig til vinstru í føroyskum politikki. Men henda samgonga hevði eisini sínar andsagnir, eitt nú tóktist tað mongum løgið, at henda samgonga meira enn nøkur borgarlig samgonga tóktist at hava eina turkatrúgv upp á tær frælsu marknaðarkreftirnar. Tá ein hugsar um, at hesar frælsu marknaðarkreftir júst í sama skeiði hava verið við at renna heimin út í størstu búskaparkreppu síðan Wall Street skrædlið í 1929. Men kanska er ræðumyndin frá áttatiárunum so greflig, at eingin føroyskur politikari torir nevna hvørki planbúskap ella blandingsbúskap, hóast sjálvt USA í hesum døgum tekur til sterkar planbúskaparligar loysnir.

Men CHE slapp so ongantíð veruliga at standa sína politisku roynd og gamla ABC samgongan dagar fram. Spurningurin er, hvat vit kunnu vænta okkum av eini komandi ABC samgongu, hvørjar møgleikar hon hevur. Støðan er broytt síðan fyrru ABC samgongu. Lutfallið í styrki er broytt og tey borgarligu stemplini vera tí sjónligari. Javnaðarflokkurin fær hart hoyggj at draga, men flokkurin fær kanska síni fingramerki á almannamálini. Her er pensjónsreformurin ovast á bredda.

Víst var ABC samgongan eyðkend av stabiliteti, men hvat var hon meira? Politiskur stabilitetur uttan politiskan dynamikk elvir til statisk samfelagsviðurskifti. Verandi valskeið verður øðrvísi enn undanfarna skeið. Búskaparliga støðan í heiminum er grundleggjandi broytt, trygdarpolitiska støðan er broytt, og Føroyar eru ikki rættiliga við í altjóða samstarvinum, hóast altjóðagerðin gongur við fullari ferð. Alt hetta ger, at tann samgonga, ið nú tekur yvir, hevur avmarkað rásarúm. ABC má tó royna at sýna størri dynamikk, hugflog, broytingarvilja og atgerðarevni enn seinast. Hetta fer, við broyttu fortreytunum í huga, at seta sera stór krøv til politiska leiðslu. So er bert at vóna, at politisku leiðslurnar megna uppgávuna og at politisku baklondini, tinglimir, skilja álvaran, tí her verða hvørki ráð ella rúm fyri solospæli.

**Sosialurin**

## Ongin kann fáa framíhjárætt til tollfría sølu á flogvøllinum



JÓHANNUS EGHOLM HANSEN
næstformður
P/F Vága Floghavn

**Vága Floghavn skal bæði halda kappingarlógina og tryggja, at fyritøkan fær best møguliga fíggjarliga úrtøku av komandi tollfría handlinum í floghavnini. Tí ber ikki til at lata Atlantsflogi sersømdir fram um onnur**

***Tíðindaskriv***

Hóast ætlaði handilin við tollfríum vørum í Vága Floghavn er boðin út í frítt útboð fyri viku síðani, heldur leiðslan í Atlantsflogi, at flogfelagið skal hava framíhjárætt til komandi tollfríu søluna á flogvøllinum.

- Vága Floghavn er eitt partafelag, sum fyrst og fremst skal syrgja fyri at tryggja sær best møguligu fíggjarligu úrtøkuna av komandi tollfría handlinum í floghavnini. Tí gera vit ikki nakra seravtalu við Atlantsflog, sum møguliga gevur okkum eina verri fíggjarliga úrtøku, sigur Jóhannus Egholm Hansen, næstformaður í nevndini fyri P/F Vága Floghavn.

Tað er óhóskandi, at leiðslan í Atlantsflogi yvirhøvur nevnir møguleikan, at Atlantsflog skal hava framíhjárætt til tollfríu søluna á flogvøllinum í Vágum.

- Vit virka á einum marknaði við kapping, og tíðin er farin frá at gera seravtalur og geva ávísum fólkum ella fyritøkum framíhjárætt ella sersømdir. Atlantsflog er longu frammanundan í kapping um tollfría sølu við tollfríar sølubúðir í øllum floghavnum, sum Atlantsflog flýgur til. Tí kann hetta ikki vera ein nýggj støða fyri flogfelagið, sigur Jóhannus Egholm Hansen.

Næstformaðurin vísir harumframt á, at P/F Vága Floghavn leggur stóran dent á at halda seg til kappingarlógina, og at sersømdir tí ikki kunnu koma upp á tal.

- Um Atlantsflog vil tryggja sær tollfríu søluna í floghavnini, er flogfelagið eins og øll onnur vælkomið at vera við í almenna útboðnum. Tað snýr seg um at lata inn eitt boð, ið er betur fyri P/F Vága Floghavn og fyri tey ferðandi, enn tað, sum onnur bjóða, sigur næstformaðurin.

- Tað er óhóskandi av leiðsluni í Atlantsflogi at brúka fjølmiðlarnar til at skapa øsing og at hótta við hægri ferðaseðlaprísum, um Atlantsflog ikki fær tollfríu søluna í Vága Floghavn. Heimurin er broyttur og tað ber ikki longur til at krevja sersømdir, sigur Jóhannus Egholm Hansen.

Vert er at leggja til merkis, at í sama tíðarskeiði, har Atlantsflog hevur haft stór avlop, hevur Vága Floghavn verðið rikin við munandi halli, ið hevur verið goldið yvir donsku og seinni føroysku fíggjarlógini og harvið av skattgjaldarunum.

P/F Vága Floghavn yvirtók í juli í ár flogvallarvirksemið frá Vinnumálaráðnum. Nevnd felagsins hevur staðfest, at ein av orsøkunum til, at yvirtikna virksemið hevur haft hall, er, at nýtslugjøldini hjá eitt nú Atlantsflogið fyri at nýta flogvøllin eru munandi lægri, enn veruligu útreiðslurnar til at reka flogvøllin eru. Nýtslugjøldini eru eisini munandi lægri enn tað, nýtslugjøldini eru í hinum floghavnunum, sum Atlantsflog flýgir til uttanlands. Tí er tað uppgáva hjá P/F Vága Floghavn at tryggja sær neyðugu inntøkurnar til at fáa raksturin at javnviga og at fáa pening tøkan til neyðugu íløgurnar í eina nútímans floghavn.

## Ferðsluviðurskifti í Klaksvík

FRÍÐRIK SIVERTSEN
Garðavegur 25

Tað er skjótt at blíva samdur um at ferðsluviðurskiftini í Klaksvík eru nógv batnað tey seinastu árini, men tó eru økið, ið framvegis ikki eru nóg væl uppdateraði.

Eitt av teimum er Garðavegurin. Har var fyri nøkrum árum síðan byrja at gera vegin í stand norðanífrá, og sær tað eisini heilt gott út suður til Jógvan við Keldu. Frá Jógvani og suðureftir er ongin vegrist við tí avleiðing, at alt yvirflatuvatnið rennur omaná og sleppur bert niðurígjøgnum í støðum, har asfaltið ikki er lagt heilt omanímóti gørðum og vegkantum, har tað síðan rennur oman í gjøgnum tún og undir húsum og ger stóran skaða. Heldur ikki er gongubreyt í niðaru síðu, og bilar standa sum best ber til, ofta til stóran ampa fyri gongufólkið. Tó er tað batnað síðan, vit fingu parkerinsvørð.

Væl vitandi at ikki eru nógvir pengar at arbeiða við hjá býráðnum, haldi eg tó, at tað átti at borið til at bøtt um hendan trupulleikan. Kanska skuldi Garðavegurin verið gjørdur einsrættaður, so at tú einans kundi koyrt suðureftir, ella kanska norðureftir? Tað hevði loyst trupulleikan við parkeringsviðurskiftunum, tí so kundi onnur síðan verið uppmáld til parkeringsbásar, men tað hevði sjálvsagt ikki loyst trupulleikan við yvirflatuvatninum. Til tað krevst, at vegurin verður grivin upp, og vegristir settar í.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.